# »Hann ið einki váðar einki vinnur«

ÍSLANDSVITJANIN
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Í gjárkvøldið bjóðaði løgmaður til døgurða á íslandsferðini, sum løgmansskrivstovan skipar fyri saman við vinnulívinum.

Við til døgurðan var alt tað føroyska ferðalagið, íslendski forsætisráðharrin, Geir H. Haarde og frú og týðandi umboð fyri íslendsku stjórnarskipanina og íslendska vinnu

Í vælkomurøðuni nevndi løgmaður at »hann sum onki váðar onki vinnur«, og at hetta kundi verið útgangsstøðið fyri hesari ferð til íslands. Løgmaður handaði gávur til íslendska forsætisráðharran og frú. Forsætisráðharrin fekk nýggju bókina um Mykines og forsætisfrúan fekk eitt turriklæð av kendu sniðgevunum Guðrun og Guðrun.

Íslendski forsætisráðharrin takkaði fyri innbjóðingina og fyri gestablídni honum varð givið á vitjanum sínum í Føroyum. Íslendski forsætisráðharrin brúkti orðatakið »Lítil maður kann eisini verða sterkur« og nevndi, at íslendingur høvdu stóra virðing fyri føroyingum. Eisini hann nýtti høvi at geva løgmanni og frú gávur, sum vóru jakkar frá klædnafyritøkuni 660 North. Løgmaður takkaði fyri og nevndi, at hetta fór at verða gott at ganga í til komandi valstríð sum verður í Føroyum komandi vetur.

Aftan á matin sang Sigrid Rasmussen nakrar sangir, og hetta komu hon og klaverspælari hennara sera væl frá.





*Jóannes Eidesgaard, løgmaður, roynir jakkan, hann fekk frá Geir H. Haarde, forsætisráðharra Íslands, við døgurðan, sum løgmaður beyð til í gjárkvøldið*



*20 fyritøkur og eini 60 fólk eru í ferðalagnum hjá løgmanni í Íslandi, sum endar seinnapartin í dag*





*Geir H. Haarde, íslendski forsætisráðharrin*